# Upptøkurnar byrjaðar

**- Rockbólkurin Chase fór leygardagin 22. septembur í studio í Keypmannahavn at taka upp til fløgu, ið ætlanin er skal koma út til jólar í ár**



*Edmund og James*

TÓNLEIKUR

*Ingrid Bjarnastein*

Chase eru als ikki nýggir í tónleikaheiminum. Bólkurin hevur skjótt 12 ár á baki, men hevur tó ikki verið virkin øll árini.

Nú bólkurin hevur mestsum ligið í dvala í eina tíð, hava tríggir av upprunamanningini gjørt av at fara í holt við eina nýggja fløguútgávu.

Í desember 1989 varð bólkurin Chase stovnaður. Teir vóru seks, ið tá mannaðu bólkin, umframt tvær kórgentur. Lehnert Kjeldsen, guitar, Niclas Johannesen, guitar, Mikkjal Joensen, bass, Óli Hansen, ljómborð, James Olsen, trummur og Edmund Jacobsen, sang. Fyrstu ferð hesir seks menninir fóru á pall, sum ein bólkur, var til nýggjárskonsertina sama árið.

## Onnur fløguútgávan

Chase hevur bert givið út eina fløgu undan hesari, ið teir nú eru farnir at taka upp. Hon varð útgivin í apríl 1992, og æt bert "Chase".

Bólkurin hevur mestsum onki havt á skránni seinastu seks árini. Tó vóru teir við til nýggjárskonsertina í ´95 og ársins songrødd í ´98.

Í september ár 2000 samdust Niclas Johannesen, Mikkjal Joensen og Edmund Joensen um at fara undir at skriva sangir til eina nýggja fløguútgávu.

Afturat av upprunamanningini hava teir fingið James Olsen, meðan Stamen Stanchev er nýggjur ljómborðspælari.

Eitt lítið studio í Keypmannahavn er karmur fyri upptøkunum, og er ætlanin at fløgan skal koma út til jólar.

# Álendsk framsýning og einmansleikur í Norðurlandahúsinum



*Anders Berndtsson*

**- Norðurlandahúsið verður frá leygardegnum 29.09.01 karmur um eina álendska framsýning, ið kallast "Við seglskútum um Kap Horn".**

MENTAN

*Ingrid Bjarnastein*

Ætlanin við framsýningini var av fyrstan tíð at fáa fram, hvussu sambandið millum Avstraliu og Finland byrjaði.

Frá 1920-30 vóru tað fyri tað mesta finskar skútur, sum sigldu millum Avstralia og Europa. Hendan framsýning vísir á lívið umborð á skútunum, søguna og fólkið, ið við var.

Endamálið við framsýningini er at vísa á lívið umborð á teimum seinastu seglskútutúrunum. Myndir vera av skútunum, og eisini verður møguleiki fyri at fáa eitt sindur at vita um søguna um siglingina um Kap Horn.

Hetta er ein ferðaframsýning, og er tað Nordens Institut á Álandi, ið skipar fyri saman við Ålands sjofartsmuseum.

## Einmansleikur

"Opalerna i Andamooka" eitur einmansleikurin, ið álendingurin Ander Berdtsson fer at spæla. 30 ára gamli álendingurin er útbúgvin á Tukak Teatrinum í Danmark og Silamiut Teatrinum í Grønlandi.

Sjónleikurin bygdur á eina skaldsøgu, ið Sally Salmien hevur skrivað, og Robert Liewendahl hevur gjørt søguna til leik.

Einmansleikurin skal lýsa lívið hjá teimum, ið vóru við seglskútunum og familjur teirra.

Í Býin

AUTO
-Dag sum nátt- -skjótt og gott-
-ALT DØGNIÐ-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

Vilja tygum við í Býin
(- hvønn hósdag